**Joen Magnus Rasmussen**
**vegna Fólkaflokkin**

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 16/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (Útgjaldið úr Samhaldsfasta skattafrítt)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
(Útgjaldið úr Samhaldsfasta skattafrítt)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 169 frá 20. desember 2017, verður henda broyting gjørd:

Í § 29, nr. 13, verður sum litra g sett:
"g) Veitingar eftir løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Lønmóttakarin rindar skatt av gjaldinum til Samhaldsfasta, ALS, Barsilsgrunnin og Heilsutrygd.

Pensjonistarnir rinda skatt av útgjaldinum úr Samhaldsfasta (AMEG), hóast hetta er skattaður skattur.

Vit eru helst øll væl nøgd við omanfyri nevndu gjøld, sum øll eru grundsúlur undir vælferðarsamfelag okkara.

Men tað er skeivt, at vit rinda skatt av hesum gjøldum, sum jú eru ein skattur í sær sjálvum.

Gjaldið til Samhaldsfasta verður hækkað upp í 3% av skattskyldugu inntøkuni frá 1. januar 2019.

Politiski boðskapurin er, at hetta verður gjørt, fyri at pensjonistarnir skulu hava kr. 1.000,00 meira um mánaðin at liva fyri.

Hetta halda helst tey flestu vera sera gott og taka fult undir við tí.

Men lat okkum hyggja at einum dømi, sum vísir, at pensjonistarnir ikki eru teir einastu, sum fáa burtur úr pensjónsnýskipanini.

Dømi:

Ein sum hevur inntøku á kr. 400.000,00 skal gjalda 3% til Samhaldsfasta. Hetta er kr. 12.000,00, so nú skuldu vit hildið, at 12 pensjonistar fáa kr. 1.000,00 meira um mánaðin, í ein mánaða í hvussu er, ella at ein pensjonistur fær kr. 1.000,00 meira um mánaðin í eitt ár.

Men roknistykkið sær heilt øðrvísi út.

Fyrst skal hesin, sum hevur goldið tær kr. 12.000,00 í Samhaldsfasta, gjalda kr. 6.000,00 í skatti beinleiðis til landskassan (uml. kr. 3.500,00) og kommunukassan (uml. kr. 2.500,00)

Síðani, tá pensionjstarnir fáa gjald úr Samhaldsfasta, skulu teir aftur gjalda skatt av hesum sama peningi, sum var skattaður tá hann varð inngoldin.

Fyri at ein pensjonistur skal hava kr. 1.000,00 meira at liva fyri, má Samhaldsfasti útgjalda kr. 1.600,00.

Pensjonisturin fær kr. 1.000,00, landskassin kr. 250,00 og kommunukassin kr. 350,00.

Tað vil siga, at ein sum hevur kr. 400.000,00 í inntøku skal gjalda:

| | |
|---|---|
| Til Samhaldsfasta | kr. 12.000,00 |
| Til landskassan | kr. 3.500,00 |
| Til kommunukassan | kr. 2.500,00 |
| | --------------- |
| Tilsamans | kr. 18.000,00 |

Samhaldsfasti, sum einans hevur tær kr.12.000,00, má gjalda soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skattur til landskassan uml. | kr. 2.000,00 |
| Skattur til kommunukassan uml. | kr. 2.500,00 |
| Til pensjonistarnar | kr. 7.500,00 |
| | ---------------- |
| Tilsamans | kr. 12.000,00 |

| | |
|---|---|
| Landskassin fær kr. 3.500,00 + kr. 2.000,00 = | kr. 5.500,00 |
| Kommunukassin fær kr. 2.500,00 + kr. 2.500,00 = | kr. 5.000,00 |
| | ---------------- |
| Almennir kassar tilsamans | kr. 10.500,00 |
| Pensjonistarnir tilsamans | kr. 7.500,00 |
| | ---------------- |
| Tilsamans | kr. 18.000,00 |

Hetta merkir, at ein, sum hevur inntøku á kr. 400.000,00, skal gjalda kr. 18.000,00 fyri at Samhaldsfasti skal kunna gjalda pensjonistunum kr. 7.500,00.

Restina, næstan 60% deila landskassin og kommunukassin millum sín.

Tað hevði verið rættari, at pensjonistarnir fingu meira. Ella at lønmóttakarin rindaði minni.

Ella møguliga at partarnir deildu soleiðis, at pensjonistarnir fingu meira, og lønmóttakarin rindaði minni.

Hetta er jú at rinda skatt av skatti.

Ein 100% skattur, sum verður forskattaður, og síðani skattaður aftur við útgjald.

Hetta er ein feilur, sum eigur at verða rættaður skjótast gjørligt.

Av tí at bæði land og kommunur fáa nógv meira inn í skatti í ár, enn roknað varð við, er rætta løtan at fremja hesa broyting nú.

Fyri ikki at gera alt ov stórar broytingar í einum verður mælt til, at fyrsta stigið verður at gera Samhaldsfasta skattafrían við útgjald.

Fyri pensjonistin merkir hetta, at hann fær næstan kr. 2000,00 meira at liva fyri um mánaðin.

Dømið omanfyri er bert um Samhaldsfasta.

Støðan er tann sama hjá lønmóttakaranum fyri ALS, Barsilsgrunnin og Heilsutrygd.

Viðmerkjast skal, at uppskotið ikki hevur verið sent til ummælis.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið verða á leið 76 mió. kr. og fyri kommunurnar á leið 101 mió kr. í 2019. Sí talvuna niðanfyri.

| | **2019** | **mió. kr.** |
|---|---|---|
| Útgjald pr. mánaða: | | 5.475 |
| Tal avpersónum (2017) | | 7.712 |
| Útgjald | | 506.678.400 |
| | | |
| Landsskattur: 15 %: | | 76.001.760 |
| Kommunuskattur: 20 %: | | 101.335.680 |
| | Íalt | 177.337.440 |

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

Við hesum lógaruppskoti verður arbeiðsmarknaðareftirlønin úr Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunninum, vanliga nevndur Samhaldsfasti, gjørd skattafrí.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 10. september 2018**

Joen Magnus Rasmussen